# ítróttur

Nr. 218 • mánadagur • 14. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Daiva gav landsliðsavboð

**Litaviski stórspælarin hjá VB varð biðin um at spæla á A-landsliðnum, men hevur gjørt av at taka t‡dningarmiklar dystir hjá VB framum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hetta staðfestir VB á heimsíðu sínari. Í undankappingarumfarinum, sum verður spælt í døgunum 21. til 27. november, skal Litava kappast við 11 onnur lond um pláss í EM-endaspælinum, sum verður í Svøríki komandi summar.

Daiva Toumaite hevur, síðani hon kom til Føroya, verið ein av allar fremstu kvinnuligu spælarunum her á landi, og í fjør varð hon uppiborið kosin sum besti spælarin.

Og eisini í Litava hava tey lagt góðu avrik hennara til merkis. Somikið væl hava tey lagt tað til merkis, at Daiva var at finna á listanum yvir spælarar, sum vórðu tiknar út til EM-undankappingina.

Men hon verður kortini ikki á liðnum. Um somu tíð, sum undankapping er á skránni, hevur VB útidystir móti ávíkavist Stjørnuni og Neistanum, sum bæði mugu metast sum argastu kappingarneytarnir hjá VB í oddinum. Og her hevur Daiva so valt, at hon heldur vil hjálpa felagnum.



Mynd: Daiva
*Daiva Toumaite fekk landsliðsboð til komandi EM-undankappingina, men hon vil heldur hjálpa VB í t‡dingarmiklu dystunum, sum standa fyri framman*

## Starvs-møgu-leikar í formel 1

Nýggja japanska liðið í formel 1 Super Aguri, ið fyrrverandi formel 1 koyrarin Aguri Suzuki stendur á odda fyri, hevur søkt um upptøku í formel 1, og hóast liðið enn ikki hevur fingið svar, so søkja tey eftir alskyns starvsfólkið, alt frá royndum formel 1 tøkningum og sniðgevum til reingerðarfólk.

Liðið hevur høvuðsstøð í fyrrverandi Arrows høvuðstøðini The Leafield Technical Centre í Oxfordshire. So um tú ert vaskikona ella skrivstovufólk, ið hevur hug til at starvast í formel 1, er hetta kanska møguleikin. Liðið hevur higartil ikki kunngjørt nógv um starvsfólk o.a., men tað skilst, at fyrrverandi BAR-Honda koyrarin Takuma Sato hevur fingið tilboð um at koyra bilin, motorurin verður Honda, og tekniski stjórin verður Mark Preston, ið fyrr hevur arbeitt fyri Arrows og McLaren.

**nud**

Kyndil-H71 19-17 (8-8):

# Einsamallir Kyndilsmenn

**Við sigrinum á H71 staðfesti Kyndil oddastøðuna, og í løtuni er ilt at síggja, hvør skal taka teir aftur**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Leikligu hæddirnar, sum kunnu væntast í einum oddadysti, komu ongan tíð til sjóndar, tá H71 vitjaði Kyndil leygardagin. Fyrst og fremst, so var dysturin spennandi, og til tíðir vóru bæði ferð og intensitetur í hásætinum, so undirhaldsvirðið mundi samanlagt vera á eini leið. Men heilt gott varð tað ongantíð.

### Skjúttarnir sviku

Fyrst og fremst, so fingu verjurnar báðar eina óvanliga lætta uppgávu, tí fyri tað allarmesta, so kundu hesar standa heilt inni, soleiðis at tær á tann hátt byrgdu fyri gjøgnumspæli av t‡dningi.

Hetta læt seg gera, tí ikki ein tann einasti av annars góðu skjúttunum hjá liðunum báðum veruliga kom ígongd hendan dagin. Hvørki Rókur, Halgir ella Piti fingu av álvara gongd í armsveigini, og tí varð hóttanin útifrá - sum annars kundi latið verjurnar upp - av ongum.

Eitt skifti var eisini líkt til, at Kyndil veruliga skuldi fara at vinda úr hoyvíkingunum. Eftir at liðini høvdu fylgst fyrstu lítlu løtuna, tóktust hoyvíkingarnir fullkomuliga at steðga upp. Í lítið korter fingu teir bara eittans mál til høldar, og høvdu teir grønu verið bara eitt sindur neyvari hesa løtuna, so kundu teir væl avgjørt dystin.

Kyndil megnaði tó ikki at toga seg langt burtur, og brádliga varð støðan koppað á høvdið. Seinastu 13 minuttirnar fyri steðgin fekk Kyndil als einki burturúr, og so kundu gestirnir toga seg upp á javnt.

### Eru sterkasta liðið

Leikliga, so gjørdist seinna umfarið nakað betri enn hitt fyrra. Enn var talan ikki um flótandi og skjótt álopsspæl, men tað eydnaðist í størri mun hjá pørtunum at spæla heldur enn bara stríða seg fram til nakrar møguleikar.

Jakob og Piti vóru eisini spakuliga um at finna rætta lagið hjá H71, og eina løtu tóktust teir vera parturin, sum skuldi draga stigini heim. Men teir megnaðu ikki at halda seinasta pettið, tá mest stóð á. Ov nógv tóktist verða flutt á herðarnar hjá Jakob hesa løtuna. Og tó at bóltsnillingurin við trimum fríspælingum á rað til Olaf Vesturgarð helt hoyvíkingunum í dystinum, so komu teir ikki nóg nær. Kyndil tók dystin og stigini, og staðfestu harvið oddasessin í deildini.

Og sum stigatalvn sær út í løtuni, so verður trupult hjá nøkrum øðrum at taka Kyndil aftur hesu megin grundspælið. Kanska hevur liðið enn ikki fingið spælið at koyrt heilt so væl, sum teir kundu hugsað sær. Men hinvegin, so hava teir støðugt fingið stigini til høldar, og so er spurningurin, hvussu sterkt liðið er, tá spælið av álvara fer at koyra.

### Fakta um dystin

**Kyndil-H71 19-17 (8-8)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Høgni Klein 6(1), Hjalti M. Jacobsen 3, Janus Einar Sørensen 3, Josef Abrahamsen 2(2), Rókur Akralíð 2, Hans Áki Dal-Christiansen 2, Marius Joensen 1
**H71:** Jakob Jónsson 6, Piti Negru 6, Olaf Vesturgarð 3, Halgir Dahl Olesen 2(1)
**Brotskøst:** Kyndil 4, H71 1
**Útvísingar**: H71 2
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen